# Skemt







## Hvussu sleppur **Watson** til Føroya?

Paul Watson er ikki serliga vælkomin til Føroya. Hann var útvístur úr Føroyum á sinni, og ætlar hann sær í land í Føroyum, noyðist hann at verða kreativur. So næsta summar ræður um at hava eyguni opin og vita, um tað ber til at síggja Watson. Hann kundi kanska verið ílætin eitt sindur øðrvísi. Kanska sum hesi dømini.

## **Blondinan** á ráðstevnu

Blondinurnar vóru savnaðar til árliga ráðstevnu, og ein av blondinum fekk møguleikan at vinna ein bil, um svaraði einum spurningi rætt. Hepna blondinan kom á pallin og varð spurd:
- Hvat er 5 ferðir 5?
- Øh 10, svaraði blondinan.
- Gev henni ein kjans afturat, rópti onkur úr salinum.
Dómararnir umhugsaðu støðuna og góvu blondinuni ein nýggjan spurning.
- Hvat er 2 ferðir 5?
- Øh 10, svaraði blondinan.
- Gev henni ein kjans afturat, rópti onkur úr salinum.



## **Kvinna** til lækna

Ein kvinna hevði til vana at fara til lækna hvønn mikudag. Men ein mikudag møtti hon ikki, og tá hon so aftur kom til lækna mikudagin eftir, mátti læknin spyrja hana:
- Hví vart tú ikki her seinasta mikudag?
- Tí eg var sjúk

## Í RANGASTRÚPAN

**Hundur ella maður í grasinum?**
Maður funnin av hundi í grasinum
*Vágaportalurin*

**Kanska tí, tey fingu húkin**
Framtíðar fiskivinna í Klaksvík
*Portal.fo*

**Skjýtur hann seg í fótin?**
Skotvápn kann fella sníkiskjúttan í Malmø
*Kvf.fo*

**Vónandi væl og leingi**
Landsliðini venja
*Sosialurin*

**Á bláman?**
Motorur datt út á Sundsverkinum
*Vagaportal.fo*

**Nei, tað er ikki gott at vita**
Ein maður er nú í varðhaldi í sambandi við innbrot í Rúsuna í Saltangará. Enn er ikki staðfest, hvørjum maðurin hevur brotið inn eftir.
*Vágaportalurin*

**Tað gongur fínt**
Yvir 100 milliónir landskassakrónur eru nú aftur í váða.
*Kringvarp.fo*

**Leingi at bíða**
Teir skutu haru í Sjendum í gjár, og var ein maður so óheppin at detta. Tyrlan hjá Atlantic var eftir manninum í morgun
*Vágaportalurin*

**Skilja púrt einki!**
Fyrrverandi stjórin í alnetsbankanum í Eik Banka undrast á, hví e-bankin hevur mist 50.000 kundar so stutta tíð.
*Vágaportalurin*

## UMAFTURAFTURUM

HØGNI DJURHUUS



# Jarðargonguferð

Ruskdagur. Svartifossur er stórur og gráur og hvítur. Áin buldrar undir brúgvunum við ferð á bláman.

Fólk í 21.aldar oljudansi við hundi í bundnum jakka í undanvindinum.

Eg berji meg ímóti váta landssynninginum, omaneftir.

Nei, tað er lygn! Arroganti heimaveðrurin, í ár er hann svartur, er ikki har. Eg hyggi til vinstru, til høgru. Nei, hann er horvin. Í ár var hann svartur.

Segði hey við hann hvønn einasta dag, har hann stóð ella lá, tjóðraður antin eystan fyri gøtuna ella vestan fyri hana. Fluttur hvønn dag. Tú sást á stykkinum, hvussu langt tjóðrið rakk, hvør radius var, tvey grøn litbrigdi. Annað runt.

Hann ønti mær ongantíð aftur, hugdi sjáldan upp. Hansara lív var at eta og sova og fitna. Einki annað. Skeitti ikki so frægt eftir ærini hinu megin ánna og hegnið.

Eina ferð, lagið og veðrið vóru góð, eg klappaði honum á høvdið, svaraði hann við at stanga. Legði eftir knænum. Tíbetur var tjóðrið ov stutt.

Annars eitt óføra gott lív, tí hann visti ikki endamálið við tí.

Ikki sum kalkunin í einum gomlum Disneyteknifilmi, sum fór undir ein beinharðan avfitingarkur. Gavst at eta og gjørdi hardcore fimleik, tí hundurin segði við hana, at hon fekk so nógv og gott at eta fyri at hon skuldi verða so feit sum gjørligt á jólum.

So fór eisini hann, hesin veðrurin. Sum tann ikki minni arroganti mórreyði í fjør og tann svarti í átta.

Heystið er ein sovorðin sorgartíð. Tá alt várins og summarsins lív fer. Krákurnar eru eftir og smáfuglarnir og gæsnar. Gæsnar sleppa ongan veg uttan til gongu til næsta hegn. Tær ganga nógv.

Krákan er ein íspegil, hon er ikki í ordan so at siga. Tí rýmir hon ikki sum flestu hinir fuglarnir.

Hetta er tann endaleysa malandi ringrásin. Men nú siga tey, at hon endar kortini, um 200 milliónir ár, um 200 milliónir veðrar í feitilendinum í stórbýnum.

Um 200 milliónir ár, um veturin sjálvsagt, hendir okkurt við sólini, so ikki verður livandi longur her á jørðini. Ikki bara í Føroyum, her er ikki livandi sum er, halda nógv og rýma, men í øllum heiminum verður ikki livandi.

Og um seks milliardir ár svølgir sólin jørðina. Tá er so eingin vegur aftur ella fram.

Men longu nú verður hugsað og eisini tosað hart um at flyta jørðina longur burtur frá sólini, burtur av vandaleið so at siga.

Heystið er sum ein jarðarferð, nógvur deyði. Og fyri at leinga pínuna verður klokkan stillað mitt í øllum myrkrinum, so heystið varar ein tíma longur. Ein myrkur tími verður fluttur eitt hálvt samdøgur, meðan samdøgrið gerst myrkari og myrkari í báðum endum.

Heystið er fíggjarlógartíð, tá almannastovan Føroyar krevur pengar til øll síni neyðstøddu. Onnur savna pengar inn frá neyðstøddum í Føroyum til neyðstødd í øðrum londum.

Og so eru tað tey, sum ganga hús úr húsi og biðja um pengar til neyðstødd í Føroyum frá fólki, sum noyðast at lata 60 prosent av lønini í skatti og avgjøldum í teirri veiku vón, at nøkur prosent fara til tey neyðstøddu í Føroyum.

Føroyingar eru gávumildir og hjálpsamir, so tey lata nøkur prosent afturat til ymiskt, sum átti at verið tikið av teimum prosentunum, sum landið tekur, ikki biður um, við dyrnar, áðrenn pengarnir koma inn um dyrnar at venda.

Heystið er innsavningartíð. Talvan gongur og bússurnar fyllast.

Verðin er ikki, hon hevur ongantíð verið og hon verður ongantíð rættvís.

Tað var ikki Guds vilji, bara ein ynskidreymur.

Tí beinir hann sólina eftir okkum.